## DAGSINS MEINING

# 2. útkall á landgrunninum

2. útbjóðing til leiting eftir kolvetni á landgrunninum lat aftur í gjár á middegi. Óvist er í skrivandi løtu, hvussu stór undirtøkan er, men eftir tí sum Sosialurin veit og kann meta um, eru eini 8-9 oljufeløg við. Hetta er nakað minni enn til 1. útbjóðing fyri fýra árum síðani. Kortini er eingin orsøk til at fella í fátt, tí eftir øllum at døma eru mong stór og meðalstór oljufeløg við í útbjóðingini, og tað merkir, at áhugi er fyri økinum, og at oljufeløg hava álit á, at her finst bæði olja og gass. Millum feløgini eru helst Statoil, ChervronTexaco, Shell, Dong, OMV, Føroya Kolvetni, Geysir og Atlants Kolvetni.

Ein orsøk til, at fleiri av feløgunum frá 1. útbjóðing, ikki eru við nú, eitt nú BP, Hess, BG og ENI, er tann, at fleiri teirra eru enn ikki liðug við sítt arbeiði og sínar skyldur frá 1. rundu. Undantakið er so Statoil, sum nú tykist gerast lokomotivið á landgrunninum. Tvs. at hesi feløg standa til at skula bora fleiri brunnar, áðrenn árið 2006 er úti. Tey hava bundið seg til at bora brunnarnar í sokallaða Gullhorninum, sum kortini ikki tykist so gullrandað longur. Hóast kolvetni er staðfest har í, er tað eisini meira ella minni staðfest, at her er helst ikki so nógv at fara eftir, sum upprunaliga hildið.

Oljufeløg sum t.d. BP, sum eigur tveir av teimum fýra brunnunum, sum eru eftir at bora frá 1. rundu, hevur alment úttalað, at har er einki at fara eftir. Vit kunnu tí rokna við, at BP og møguliga eisini hini oljufeløgini frá 1. rundu, fara at biðja um samráðingar við Oljumyndugleikarnar um møguliga at kunna flyta teir brunnarnar í øki uttan fyri »Gullhornið«. Hugsandi er tí, nú fleiri av hesum feløgunum ikki eru við í 2. útbjóðing, eftir at loyvini eru latin í 2. útbjóðing, antin vilja royna at »farma« inn í nýggju loyvini longur norðuri á landgrunninum ella tey fara at heita á myndugleikarnar um at fáa tillutað onkur nýggj øki at bora írestandi brunnarnar frá 1. Rundu í. Hetta er so nakað, sum Oljufyrisitingin bestemmar, men vert er at hava ein góðan dialog við feløgini, fyri at fáa tað besta burturúr.

Tað er greitt, hvat úrslitið enn verður av 2. útbjóðing, at tað har neyvan verður talan um at bora í fyrstu atløgu. Feløgini vilja fyrst sleppa at gera kanningar . Hetta merkir, at tað neyvan verður nøkur boring á landgrunninum fyrr enn á sumri 2006. Tá skulu teir fýra brunnarir frá 1. útbjóðing borast. Spurningurin er so, nær vit kunnu vænta brunnar aftrat í sambandi við 2. útbjóðing. Alt hetta er sjálvandi ikki nøkur góð støða fyri føroyska vinnu og myndugleikar, sum hava vónað, at okkurt fór at henda í næsta ár.

So vit eru noydd at bíða til 2006, sum afturfyri kann gerast eitt rimmar boriár. Áhugaverdi spurningurin er tá bert, hvar teir írestandi brunnarnir skulu borast. Tað kann virka eitt sindur bakvent, um brunnarnir, sum skulu borast í 2006, skulu vera í tí lítið áhugaverda Gullhorninum, nú tá alt bendir á, at mest áhugaverdu økini eru longur fyri norðan, í teigunum, sum helst fleiri hava søkt um í 2. útbjóðing. Vónandi megna okkara myndugleikar saman við oljufeløgunum at skipa so fyri, at virksemi verður so skjótt til ber og at tað verður í økjum, har mest sannlíkt er at gera fund. At vit fáa ein brunn á basaltinum er helst nakað, sum øll sóknast eftir.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Staðbundnar nevndir…og hvat so?

**Helena Samuelsen**
*í Hoyvík 12.11.04*

Kommunuval hevur verið. Færri kommunur eru, nú valið er av, men nógvar nýggjar staðbundnar nevndir.

Tað er ivaleyst bæði rætt og rímiligt at leggja kommunur saman í størri eindir. Fyri tann skuld skulu bygdirnar ikki hvørva av føroyakortinum, men heldur varðveita síni eyðkenni, staðanøvn og alt annað, ið hoyrir bygdini til. Ein staðbundin nevnd skuldi kunnað vart bygdina í so máta, og verið góð í ráðum hjá kommunala myndugleikanum.

Síggi í bløðunum, at bygdirnar í Tórshavnar kommunu á valinum 9. nov. hava valt sínar nevndir. Men vit í Hoyvík, størstu bygdini í kommununi, hava ongantíð fingið tann møguleikan. Og søgan er henda:

Fyri fjórðingsøld síðan tóku markatalsbygdin Hoyvík og niðursetubygdin Hvítanes seg burtur úr Tórshavnar uttanbíggja kommunu og løgdu saman við Tórshavnar kommunu. Ikki øll vóru so fegin um tað tá, tí vit vistu, hvat vit høvdu, og ikki hvat vit fingu.

Við samanleggingini var avtalað ein Hvítanesnevnd fyri Hvítanes og ein ráðleggingarnevnd fyri Hoyvík. At tey, sum samráddust um samanleggingina, gjørdu mannamun á grannabygdunum báðum, tyktist beinanvegin so løgið.

Í okkara ráðleggingarnevnd vóru vald fólk, sum kendu Hoyvíkina og hoyvíkshagan, áðrenn nøkur húsagrund var í haganum, og at kalla øll, ið hava sitið í hesi nevnd, eru fødd og uppvaksin í Hoyvík ella í Hoydølum.

Ráðleggingarnevndin í Hoyvík fekk kort úr Havnini yvir allar útstykkingar í Hoyvíkshaganum fyrstu árini og gjørdi so uppskot til gøtunøvn og royndi at varðveita tey fáu staðanøvn, sum vóru í haganum. Síðan var farið í søguna, fyrst í bygdarsøguna og síðan í føroyasøguna. Men gøtunavnanevndin í Tórshavnar kommunu góðtók ikki altíð uppskot frá staðbundnu nevndini og verri enn so. Og tað var nevndin í Havn, sum hevði síðsta orðið at siga, áðrenn býráðið setti nøvn á.

Í dag man vera lítið lurtað eftir, hvat staðbundna nevndin í Hoyvík sigur, tí gøtunøvnini í seinastu útstykkingunum í Hoyvíkshaganum eru ein hurlivasi, sum ikki fylgir teimum ætlanum, sum hoyvíkingar høvdu. Tað síggja øll, sum hava fylgt eitt sindur við, og sum kenna føroyasøguna og leistin, ráðleggingarnevndin alla tíðina hevur arbeitt eftir.

Soleiðis er skilið í Hoyvík. Hetta er eitt sindur løgið, tí tveir teir seinastu borgarstjórarnir í Tórshavnar kommunu hava bygt sær hús í hoyvíkshaganum og aðrir býráðslimir við. Teir áttu at fylgt við, hvussu arbeitt verður í hesum parti av kommununi.

Um tað nú verður gøtunavnanevndin í Havn, sum fer at seta gøtunøvn á gøtur í Nólsoy, Hesti, Kirkjubø og á Velbastað, fer tíðin at vísa. Men nú er ein lóg, sum sigur, at nøvn skulu setast á hvørja gøtu í hvørjari bygd. Og gøtunavnanevndin í Havn eigur nú í hvussu so er seinasta orðið í hesum bygdum. Mær er sagt, at í Kollafirði er ein Kollafjarðarnevnd og eisini ein gøtunavnanevnd, sum er ráðgevandi hjá gøtunavnanevndini í Havn.

Um okkara lokala ráðleggingarnevnd í Hoyvík so er ein gøtunavnanevnd, sum skal leiðbeina gøtunavnanevndina í Havn, so skuldu vit í hvussu so er eisini havt eina Hoyvíksnevnd so sum kommunustýrislógin heimilar, og sum so verður vald á valstaðnum, tá kommunuval er, eins og tað verður gjørt aðrastaðni í kommununi.

Men í Hoyvík og eisini á Argjum átti at verið nóg mikið við gøtunavnanevnd, sum vóru javnstillaðar við gøtunavnanevndina í Havn, tí Hoyvík og Argir eru mestsum partar av stóreindini. Hinar bygdirnar eru hóast alt longri burtur frá miðjuni og hava tí eisini onnur áhugamál at røkja. Eri púra samd við tí, Sámal Matras Kristiansen skrivar í Skáanum í dag 12. nov. um staðbundnu nevndirnar. Tað hevur alt at siga, hvussu politikarar og serliga starvsfólkið hjá kommununi vilja samarbeiða við tey, sum bara eru ráðgevandi.

– – –

Og eitt aftrat. Tað er ikki sjáldan at hoyra fólk, sum búgva í Hoyvík, Hoydølum ella á Argjum, siga, at tey búgva í Havn. Tað bæði argar og ørkymlar. Tá so Havnin verður skrivað á brøv við gøtunavni í Hoyvík, so kann ein postmaður fara at ivast í, hvat postøki eigur brævið. Her má vend koma í.

# Til Havnar

**Sjúrður Hansen**
*í Paradís í Gøtu (við samstarvi, sjálvræði og kanska samanlegging)*

Føroyar, ein sambýur. Øll fara til Havnar, men 18.000 ráða (og gjalda). Býráðið í løgtingið og bygdirnar sum Paradis.
**NB.** Hvussu Tórshavnar Býráð og hinir 'stóru' býirnir skulu vera fyri øll, má bara framtíðin vísa.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Orðloysingurin Heðin Mortensen!

**Høgni Mikkelsen,**
*býráðslimur, Sambandsflokkurin*



Tey, sum hava verið vitni til glantrileikin um skipan av nýggjari samgongu í Tórshavnar Býráð bæði undrast og øtast.

Allur moralur og sømuligheit eru blakað fyri borð til frama fyri kyniskt maktspæl og reindyrkaða opportunismu.

Óreiðiligheit og lokabrøgd slóa nú vegin til hægsta álitissessin í størstu kommunu í landinum.

Lønin hjá Heðin Mortensen fyri at stinga egnar floksfelagar í ryggin og leypa frá gjørdum avtalum er, at Heðin Mortensen nú er kosin borgarstjóri í nýggju samgonguni millum Javnaðarflokkin, Tjóðveldisflokkin og Heðin Mortensen í nýggjum hami sum javnaðarmaður.

Tað stendur rimmarfast og er ein óreingiligur veruleiki, at Heðin Mortensen tann 10. november 2004 umleið kl. 01.30 uttan fyrivarni skrivar undir eina bindandi samgonguavtalu millum Fólkaflokkin og Sambandsflokkin um samstarv í Tórshavnar Býráð fyri komandi fýra árini, har borgarstjórin var valdur og allir nevndarformanssessinir mannaðir.

Samgongan var fingin undir land og allir partar halda nú standa væl til. Samgongufelagarnir fegnast um nýggju avtaluna og fara sum natúrligt er heim at hvíla seg eftir eitt drúgt og stríggið valkvøld.

Men hvat ger svíkurin Heðin Mortensen? Hann fer beinleiðis av fundinum og uttan at boða sínum floksfeløgum frá fer hann á nýggjan fund við Tjóðveldisflokkin og Javnaðarflokkin um skipan av einari aðrari samgongu.

Sjálvsagt er Heðin sjálvur borgarstjórakandidatur, tí einki minni enn hægsti sessur í býráðnum, sum hann hevur tráa so leingi eftir, kann metta hansara markleysu maktgirnd.

Enn einaferð ger Heðin eina avtalu við tveir aðrar flokkar um samgongu uttan nøkur fyrivarni, har nevndarsessirnir eisini verða býttir millum flokkarnar. Nevndarsessir verða eisini tillutaðir sambandsflokkinum, uttan at hansara floksfelagar eru so frægt sum kunnaðir um nakað sum helst av tí, sum fer fram.

Ongin kann vera í iva um, at Heðin Mortensen hevur gjørt seg sekan í einum sera álvarsligum álitis- og lyftisbroti, sum ongantíð verður rættað uppaftur.

Persónurin Heðin Mortensen er rætt og slætt og ikki til at líta á og er tað tí uppá sítt pláss, at skýra komandi býráðsformannin við sínum rætta heiti, sum er »orðloysingur«!

Tá vandi var fyri, at borgarstjórasessurin var í vanda skifti Heðin bara enn einaferð hest. Maðurin er jú ein politiskur vingluskøltur uttan støðufesti ella skruplir.

Heðin útnevnir seg frá degi til dags frá at vera sambandsmann til at verða javnaðarmann og meldar seg galant inn í javnaðarflokkin, sum tekur ímóti við opnum ørmum.

Javnaðarflokkurin saman við tjóðveldisflokkinum gera so ikki mætari enn at tilnevna Heðin til borgarstjóra enn einaferð, og hesaferð við tí sannførandi grundgeving, at Heðin var vorðin ein hollur og álítandi javnaðarmaður.

Skommin er teirra og lat javnaðarflokkin og tjóðveldisflokkin eiga hana.

Niðurstøðan av øllum hesum sirkusi má vera, at Heðin Mortensen kann ikki takast fyri fult. Hansara undirskrift er hvørki bindandi ella álítandi og ongin kann taka mannin í álvara eftir hetta.

Um Heðin framvegis heldur seg vera álitismann og ikki orðloysing, so eigur hann at krevja uppreisn. Ger hann ikki tað hevur hann sjálvur viðurkent henda dóm, sum allar tíðir fer at standa sum ein skammblettur bæði fyri hann og hansara samstarvsfelagar, javnaðarflokkin og tjóðveldisflokkin og ikki minst Tórshavnar kommunu.



**Avtala**

Fólkaflokkurin, *Jan Christiansen, Sjúrður Olsen, Bjarti Mohr og Annika Olsen*, og Sambandsflokkurin, *Heðin Mortensen, Høgni Mikkelsen og Beate L. Samuelsen*, eru samd um, at flokkarnir báðir halda fram í samgongu í Tórshavnar Býráð komandi valskeið.

Flokkarnir eru samdir um, at Fólkaflokkurin framhaldandi hevur borgarstjóran, ímeðan Sambandsflokkurin hevur 1. varabýráðsformannin.

Somuleiðis eru flokkarnir samdir um, at Sambandsflokkurin framhaldandi hevur formansessin í byggi- og býarskipanar-, sosialu- og mentamálanevndini. Fólkaflokkurin kemur at hava formanskapin í teknisku-, havna- og heilsu, og umhvørvisnevndini.

Flokkarnir eru samdir um, at koma saman aftur seinrapartin fyri at útgreina samgonguskjal og nevndarbýti. Somuleiðis skulu flokkarnir tosa um, um samgongan skal hava Javnaðarflokkin við í samstarvið.

Hendan avtala er bindandi, og vilja vit øll virða hana

Tórshavn 10. november 2004

# Glantrileikur ella ikki

**Heðin Mortensen**



Dúgliga hevur verið tosað og skrivað um »glantrileik« síðani kommunuvalið síðsta týsdag. At nógv hevði betur verið ósagt, er helst tað einasta, allir partar munnu vera samdir um.

Men tá formaður Sambandsfloksins roynir at tváa sínar hendur og siga, at hann »ongantíð hevur verið partur av samráðingunum«, er tað ikki meira enn partvíst rætt.

Víst var Kaj Leo Johannesen ongantíð fysiskt til staðar undir hesum samráðingum, men umvegis telefonina varð nógv tosað við hann valnáttina.

Sjálvur vildi eg ikki fara undir nakrar tingingar við valdu býráðslimirnar hjá Tjóðveldisflokkinum og Javnaðarflokkinum, fyrr enn eg hevði fingið »grønt ljós« frá floksformanninum.

Hetta kunnu onnur eisini vátta, tí tað var ikki bara eg, sum umvegis telefonina vendi mær til Kaj Leo Johannesen hasa náttina.

Um hálvgumfimmtíðina tosaði eg við hann í eitt korter, og tað kann ein og hvør siga sær sjálvum, at fyrstvaldi býráðslimur floksins og floksformaðurin fara ikki mitt um náttina eftir eitt val at tosa saman í telefon, tí teir vilja skifta um bindiuppskriftir!

So Kaj Leo Johannesen kann ikki siga seg hava verið óvitandi um tað, ið hendi hasa náttina. Tað er veruliga burtur úr vón og viti, um nakað er tað!

Tá vit so aftur tosaðu saman í telefonini um áttatíðina, samdust vit um, at býráðslimir floksins og formaðurin sjálvur skuldu hittast til fund á Farex, og hann lovaði at geva Beate L. Samuelsen og Høgna Mikkelsen fundarboð.

Á tí fundinum legði eg fram tað, eg hevði vunnið Sambandsflokkinum um náttina, so flokkurin kundi fáa størstu ávirkan á leiðsluna í landsins størstu kommunu komandi fýra árini.

Tað, ið varð lagt á borðið, var snøgt sagt besti møguleikin hjá Sambandsflokkinum í Tórshavnar kommunu síðani 1996, tá flokkurin forsvav seg og vaknaði aftur í andstøðu.

Hetta í sjálvum sær átti at verið ivaleysa gott grundarlag fyri einari annulering av fyribils avtaluni við Fólkaflokkin, ið als ikki var so »klokkuklár«, sum Jan Christiansen hevur rópt um, men bert var ein fyribils avtala, ið legði upp til at hittast aftur til víðari tingingar.

Í »klokkukláru avtaluni« varð enntá lagt upp til at fáa ein triðja flokk uppí. Og tað dugir ein og hvør at siga sær sjálvum, at við enn fleiri pørtum uppií hevði Sambandsflokkurin neyvan vunnið, men bara mist.

Kortini hendi á fundinum á Farex tað løgna, at Sambandsflokkurin skoytti ikki um at fáa ta stóru ávirkan, honum stóð í boði!

Tað, sum síðani er hent, kenna øll. Fyri mín part eri eg fegin um ta góðu móttøku, eg havi fingið í Javnaðarflokkinum, eftir at eg frá Sambandsflokkinum fekk valið millum »at vera skotin ella hongdur«.

# Finnbogi Ísakson og Heðin Mortensen

**Jan Christiansen,**
*borgarstjóri*



Fyrrverandi bæði ting- og landsstýrismaður og formaður í tjóveldisflokkinum Finnbogi Ìsakson hevur í bløðunum eina viðmerking til býráðsvalið og tað rumbul, ið hevur verið við at fáa skipað eina samgongu í Tórshavnar Kommunu.

Finnbogi skrivar: »Tað er ein harrans lætti, at høvuðsstaðurin nú fær eina nýggja býráðsamgongu og ein nýggjan borgarstjóra«. Víðari sigur hann: »Samgongan sum hevur rátt tey seinastu fýra árini, mann hava verið tann vánaligsta í eini 40 ár«.

Men Finnbogi leggur afturat, at nýggi borgarstjórin Heðin Mortensen, er eitt fund fyri komandi býráð.

Høvuðsgrundgevingin yvir harða dómin av sitandi samgongu, eru tær óteljandi byggigølurnar, sum hava verið. Tað tykir mær eitt sindur løgi, at Harra Ísakson kann koma til ta niðurstøðuna. Heldur átti Finnbogi at nevt hvørjar hesar mongu byggigølur eru, og somuleiðis veit Finnbogi, at sjálvur Heðin Mortensen, hevur sitið sum formaður í nevndini - ja, á hægstu rók - tá tað umrøður bygging í býnum. So niðurstøðan hjá Finnboga má skiljast soleiðis: at Heðin, sum høvuðsmaður aftanfyri byggigølurnar, er sera væl skikkaður sum borgarstjóri í høvuðsstaðnum.

Sjálvsagt kann fyrrverandi løgtingsformaðurin hava eina meining um, hvussu kommunan hevur verið rikin, men tað tykir mær, at Finnbogi við síni avgjørdu meining í allstóran mun, bert hugsar um seg sjálvan.

• Tað at vit loystu barnaansingartørvin, sýnist Ísakson ikki at vekta nógv, ivaleyst, tí hann sjálvur ikki hevur tørv á hesi tænastu.

• At vit av øllum alvi hava roynt at gera tað møguligt hjá fólki at fáa egnan bústað, hevur helur ikki hansara áhuga. Ísakson hevur jú stór og góð hús við útsýni yvir allan býin.

• Tað at ferðsla og parkering í býnum hevur verið sett frammaliga, fær somu virðing frá fyrrverandi løgtingsformanninum, allarhelst tí hann hevur ikki koyrikort.

• Finnbogi er ikki gamal maður, og vónandi er heilsan góð, tí heim til minnisveik og gomul eru ikki sett frammaliga í hansara huga.

Finnbogi Ísakson skrivar eisini: »Tí hvør skuldi kent seg bundnan av einari avtalu við so komiskum innihaldi sum henni millum Fólkaflokkin og Sambandsflokkin? Í hvussu so er ongin royndur politikari við respekt fyri sær sjálvum«.

Haldi, at Finnbogi við at rósa Heðini Mortensen, tá hesin leypur frá skrivligum avtalum, sigur ikki so lítið um seg sjálvan, og kanska tjóveldisflokkin. Øll kenna vit rumblið, ið er í Tjóðveldisflokkinum, har tinglimur ikki virðir sína egnu undirskrift. Men hví skal hann tað? Fyrrverandi floksformaðurin Finnbogi Ísakson sigur jú beinleiðis, at ein royndur politikari við respekt fyri sær sjálvum, heldur ikki avtalur.

Vónandi hevur Høgni Hoydal hægri moral enn undanmaður hansara.